# Jóan Magnus í Smiðjuni

**Jón Magnus Joensen hevur framsýning í Smiðjuni í Lítluvík í døgunum frá 30. september.- 6. oktober. Opið er allar dagar frá kl. 15- 20**

FRAMSÝNING
*Tíðindaskriv*

Við á framsýningini eru fleiri enn 40 oljumálningar. Myndaevnið er føroyska náttúran, bygdalagið og ljósið.

Jón Magnus hevur gingið á listaháskúla í Hillerød og hevur tikið lut á mongum framsýningum áður - bæði á ólavsøkuframsýningum, framsýningum hjá Lions Club v.m. Hetta er triðja ferðin, hann sýnir fram í Smiðjuni.

Stílurin hjá Jón Magnus er lættur, litríkur og expressionistiskur.

# Zacharias í Focus

**Fríggjadagin 1. oktober kl. 16 til 18 letur Zacharias Heinesen upp málningaframsýning í Galerie Focus í Havn**

FRAMSÝNING
*tíðindaskriv*

Bygdin og náttúran er tema fyri hesi framsýning. Framsýningin verður opin til 15. oktober, týsdag til fríggjadag kl. 14 til 18 og leygardag kl. 16 til 18.



*Zacharias Heinesen letur fríggjadagin upp framsýning í Galerie Focus í dag*

# Keypið sloyfur

*Tíðindaskriv*

Ljósareyða sloyfan er symbol fyri átakið »Ì hernað móti bróstkrabba«

Sloyfan kann keypast í handlum kring landið

Tey sum keypa sloyfuna stuðla arbeiðinum hjá Bót til Bata

Í oktober mánaði verður runt um í heimi varpa ljós á bróstkrabba.

Hagtøl vísa at 1 av 10 kvinnum og 1 av 100 monnum verða rakt av bróstkrabba. Bróstkrabbi er tað slagi av krabbameini, sum mest er av í Føroyum.

Í Føroyum fáa umleið 25 kvinnur árliga staðfest hesa sjúku og talið økist tíverri.

Við at keypa ljósareyðu sloyfuna, sum kann keypast í handlum kring landið í oktober mánað, ert tú við at stuðla arbeiðinum hjá Bót til Bata.

Bót til Bata er ein bólkur av sjálvbodnum kvinnum, sum eru skurðviðgjørdar fyri bróstkrabbamein.

Hesar kvinnur veita stuðul, vegleiðing og ráð til arðar kvinnur, ið eru ella skulu skurðviðgerast fyri krabbamein í brósti. Harafturat arbeiðir bólkurin fyri at fremja áhugamál hjá hesum sjúklingabólki, mótvegis mynduleikum og heilsuverki og at fremja upplýsandi og vegleiðandi virksemi.

# Vassula Rydén talar í Vesturkirkjuni

**Vassula Rydén fer at tala í Vesturkirkjuni um »Satt Lív í Guði« - boðskapir, sum hon gjøgnum innblástur hevur tikið ímóti frá Guði síðani 1985**

FORKUNNUG VITJAN
*tíðindaskriv*

Øll eru hjartaliga vælkomin í Vesturkirkjuna í Havn týskvøldið tann 5. oktober kl. 19:30 í sambandi við at Vassula Rydén vitjar í Føroyum. Í sambandi við vitjanina er fyrsta bind av boðskapunum umsett til føroyskt, og hetta eintak verður at fáa ókeypis eftir taluna í Vesturkirkjuni. Útyvir niðanfyrinevndu lýsing fæst nærri at vita á altjóða heimasíðuni www.tlig.org og á føroysku heimasíðuni www.slig.org

## Um Vassulu

Vassula Rydén er griksk, fødd í Egyptalandi og hoyrir til tað griksk ortodoksu kirkjuna. Mamma at tveimum synum og kona at einum svenskum ríkisborgara, búði hon meginpartin av lívi sínum í londum í triðja heiminum.

Í 1985, meðan hon búði í Bangladesh, vendi Guð sær til Vassulu gjøgnum hennara verndareingil Daniel, og seinni, eftir eina reinsan og andaligan vøkstur, bjóðaði Guð Vassulu at tæna Honum við at bera Hansara guddómligu orð út til øll fólk. Vassula tekur ímóti hesum innblástri gjøgnum andborin orð og andbornar sjónir. Guð bað hana kalla hesar profetisku boðskapir, "Satt Lív í Guði". "Satt Lív í Guði" er eitt guddómligt kall til okkum øll til at iðra okkum, til sáttargerð, frið, kærleika, og fram um alt, til einleika kirkjunnar.

Innblástu handritini av "Satt Lív í Guði", nú tøk á fleiri enn 40 tungumálum, hava í túsundatali av hollum og trúgvum lesarum, sum hava tikið orðini til sín við náði Heilaga Andans og bera ávøkst í tænastum, so sum grundleggjan av vælgerðarheimum til frama fyri tey fátæku, nevnd Beth Myriam (Heim Mariu).

Síðani 1988 hevur Vassula verið boðin at tala í yvir 60 londum og hevur haft yvir 700 framløgur. Vassula fær onga samsýning og ongar persónligar materiellar fyrimunir fyri hennara ómak. Harrin segði við hana: "Eg havi givið tær fyri einki, gev fyri einki."

## Áheitan

Kæri lesari,

Guð er sorgarbundin, tí vit gera uppreistur móti Honum. Hvat er menniskja, at tann Hægsti tekur sær stundir at hugsa um okkum? Og tó, tað ger Hann. Sum ein burturgloymdur faðir, óttafullur um børn síni, kemur hann at leita eftir okkum. Guð hellur seg allan vegin niður frá trónu Síni fyri at frelsa okkum. Guð kemur til okkum øll, sjálvt til tey mest neyðarsligu, lat tí ikki hurðina aftur fyri Andliti Hansara.

Guðs ríki kemur ikki so sum menniskja hevur spátt, og offurið, sum Guð biður okkum um í dag, er ein broyting innanífrá. Frá hvørjum einstøkum av okkum biður Harrin okkum um eitt iðrandi hjarta, tí vit kunnu ikki halda okkum vera gudrøkin og falsleys, uttan so at ein ber ávøkst í iðran. Lat okkum opna hjørtu okkara og lurta eftir tí, sum Andi Hansara sigur okkum.

## Viðmæli frá teologi

LJUDEVIT RUPCIC, OFM, teologur, lærari í eksegesu í Sarajevo

Vassulu'sa royndir (erfaringar) við Guði er ein varandi og ótømandi kelda av vísdómi, kærleika, eldhuga fyri Guði og frelsu heimsins. Av hesi orsøk er vitnisburðurin sannførandi, stimbrandi og fullur av gleði. Fyriuttan umvending og eitt kall til mannaættina um at svara kærleika við kærleika, er eisini umsorgan fyri einleika kirkjunnar. "Kærleikin elskar teg" (3/7-92) merkir - í Vassulu'sa samrøðum og sameining við Guð - at hvør einstakur av okkum kann seta seg í Vassulu'sa stað. Guð elskar ein og hvønn á henda hátt. Allastaðni í hennara skrivibókum merkja vit Anda Kærleikans. Náðin streymar í øllum støðum; Heilaga Andin er til verka allastaðni og gevur í yvirflóð. Allastaðni hoyrir ein fótafet Harrans.

Hinvegin átti ein at grunda yvir, hvagar Guðs boðskapur gjøgnum Vassulu vil føra, um hesin verður settur í verk. Um fólk vendu eygu síni móti kærleikanum í Guði og menniskjum, vildu tey verðið leidd til at elska Guð og hvønn annan. Um fólk svaraðu áheitanini um at biðja, vildi boðskapurin breitt út um allan heimin ein takksemisnóta til Guð. Um ein góðtekur, at einleiki má vera millum kristnu kirkjurnar, vildi ein vón longu verið fyri at uppfylla Jesu lyfti — "eitt seyðafylgi, ein hirði" (Jóh. 10,16). Um fólk góðtóku Guð á tann hátt sum Vassula mælir til, vildi Hann longur verið "alt í øllum" (1 Kor. 15,28). Um fólk tóku Vassulu'sa ávaring móti Sátan í álvara, vildi Sátan longu verið burturrikin úr menniskjunnar hjørtum og úr heiminum. Um fólk vildu givið gætur eftir Guðs kalli gjøgnum Vassulu, vildu allir menn og allar kvinnur longu verið halgimenni. Um øll gjørdu royndirnar hjá Vassulu til sínar, vildi tann persónliga søgan hjá hvørjum einstøkum, og tessvegna søgan hjá allari mannaættini, verið ein sangur kærleikans.




Móttøka og opið hús á

Landssjúkrahúsinum

**Fríggjadagin 1. oktober kl. 14 - 17** verður almenn móttøka í nýbygninginum á Landssjúkrahúsinum.

**Leygardagin 2. oktober frá kl. 13 - 16** er opið hús í nýggja bygninginum. Starvsfólk á Landssjúkrahúsinum fara at greiða frá virkseminum á teimum fimm nýggju hæddunum og eisini verður ein framsýning. Við fyribyrgjandi átøkum í huga, fara vit harumframt at bjóða teimum vitjandi einfaldar mátingar av heilsustøðuni.

LANDSSJÚKRAHÚSIÐ

J.C. Svabosgøta, 100 Tórshavn, Tel +298 30 45 00, Fax +298 31 00 64, www.lsh.fo

www.sansir.fo




# Nýggj skaðastova og intensiv deild lata upp

**Mánamorgunin komandi letur gamla skaðastovan á Landssjúkrahúsinum aftur, og samstundis verður bráðfeingis móttøkan á 1. hædd í nýggja sjúkrahúsbygninginum tikin i nýtslu**

SJÚKRAHÚS

Virksemið í nýggju bráðfeingis móttøkuni verður væl meira umfatandi enn møguleiki var fyri á gomlu skaðastovuni. Góðar umstøður eru til bæði kirurgiska og medisinska viðgerð, og framyvir fer fyrsta viðgerðin av øllum bráðfeingis sjúklingum at byrja í bráðfeingis móttøkuni.

## Nýggja inngongdin ætlað bráðfeingis sjúklingum

1. hædd í nýggja bygninginum fer umframt bráðfeingis móttøkuna at hýsa intensivu deild, viðrakning og einari kirurgiskari dagdeild. Hesar deildir lata eisini upp mánamorgunin.

Tá lata eisini høvuðsdyrnar í nýggja bygninginum upp. Hendan inngongdin er einans ætlað bráðfeingis sjúklingum. Øll onnur - sjúklingar, vitjandi og viðskiftafólk annars - skulu framvegis nýta tær gomlu inngongdinar á Landssjúkrahúsinum, eisini um tey hava ørindi í nýggja bygninginum.

## Opið hús um vikuskiftið

Farið varð undir at flyta inn í nýggja sjúkrahúsbygningin stutt eftir summarferiuna, og skurðgongin á 2. hædd varð sum tann fyrsta tikin í nýtslu 23. august. Innflytingin hevur gingið væl, og nú vantar bert 1. hædd at takast í nýtslu.

Men áðrenn tað hendir, fær almenningurin høvi at síggja nýggju umstøðurnar. Fríggjadagin verður almenn móttøka og leygardagin er opið hús í nýbygninginum, har starvsfólk á Landssjúkrahúsinum fara at vísa runt og greiða frá virkseminum á teimum fimm hæddunum.



*Góðar umstøður eru bæði til kirurgisia og medisinska viðger í nýggju hølunum á Landssjúkrahúsinum*

*Mynd: Jens Kristian Vang*

# Ferðamiðstøð í Vestmanna

**Partafelagið Vestmanna Tourist Centre og Vestmanna Timburhandil hava undirskrivað sáttmála um bygging av ferðavinnumiðstøð á Havnalagnum Inni á Fjørð í Vestmanna.**

FERÐAMIÐSTØÐ
*tíðindaskriv*



*Poul Erik Johannesen, Karl Simonsen, Gunnar Skúvadal og Louis Kristensen frá VTC og Óli Hansen og Regin Joensen úr VT*

Bygningurin verður liðugur 1.apríl 2005 og letur upp alment 1.mei 2005.

Louis Kristensen, stjóri, sigur, at hann er sera spentur uppá, hvørja móttøku bygningurin fær, tí onki líknandi er í Føroyum frammanundan.

- Samstundis sum vit hava matstovu, kunningarstovu og sølubúð á 1.hædd, so er eitt stórt høli í erva, sum kann brúkast til nógv ymisk endamál, til dømis smáar ráðstevnur, framsýningar ella tiltøk fyri børnum, sigur hann.

Louis Kristensen leggur afturat, at stramma tíðarætlanin ger, at 2. hædd neyvan verður liðug til næsta summar.

Óli Hansen, stjóri í Vestmanna Timburhandli sigur, at hóast tíðarætlanin er knøpp, so fer hon at halda.

– Vit smíða element til bygningin inni í høllini hjá Timburhandlinum samstundis sum betongarbeiðið verður gjørt uti, sigur hann.

Bygningurin verður við bátahylin Inni á Fjørð, eitt hanagleiv frá har sum bátarnir fara undir Vestmannabjørgini.

## Fakta

Vestmanna Tourist Centre í tølum

| | |
|---|---|
| Samlað vídd | 230 fermetrar |
| Matstova | 70 fermetrar |
| Sitipláss | 70 fólk |
| Kunningarstova/Sølubúð | 50 fermetrar |
| 2. hædd | 120 fermetrar |
| Starvsfólk | 4-5 (í háárstíð) |
| Søkt er um skeinkiloyvi | |

# Vit taka heilsulig atlit

**Sodavatn er verri fyri heilsuna enn grønar keks, og tí sluppu grønu keksirnar undan avgjaldi á hesum sinni**

FÍGGJARLÓGIN
*Páll Holm Johannesen*
*pall@sosialurin.fo*

Teimum, ið dámar væl at roykja og sutla sodavatn, mugu komandi ár longur niður í lummarnar fyri at fáa fatur á hesum vørum.

Sambært fíggjarlógaruppskotinum hjá landsstýrinum eru ætlanir um at leggja avgjald á bæði sodavatn og tubbak. Ætlanin er, at avgjaldið á tubbak skal økja úr 0,80 krónum til 1,10 fyri sigarettina, meðan avgjaldið á sodavatn fer úr null krónum upp í 2,40 krónum fyri liturin. Landsstýrið metir, at avgjøldini fara at geva 35 mió. krónur í eyka inntøkum.

Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum, Bárður Nielsen, sigur, at tað er ongantíð heppið at leggja avgjald á vørur, men tað varð neyðugt, um landsstýrið skuldi sleppa at raðfesta eitt nú almanna- og heilsumál hægri.

Spurdur, hví júst sodavatn og tubbakk eru tikin úr rúgvuni, svarar landsstýrismaðurin, at tann avgerðin er tikin eftir heilsuligum atlitum.

## Ongar keks og posar

Sambært fíggjarlógaruppskotinum er ikki ætlanin, at avgjald verður lagt á nógv umrøddu grønu keksirnar og plastik posarnar, sum undanfarin fíggjarlógaruppskot hava boðað frá.

Spurdur, hví landsstýrið ikki hevur lagt seg eftir, at seta avgjøld á søtmeti sum keks og annað, tá landsstýrið velur at taka heilsulig atlit, svarar Bárður Nielsen, at ein arbeiðsbólkur í almanna- og heilsumálaráðnum og fíggjarmálaráðnum ikki hevur mett, at keks eru eins skaðiliga sum sodavatn.

Landsstyrismaðurin hevði kortini onga kanning, sum prógvaði hetta uppáhald. Spurdur, hví landsstýrið ikki hevði valt at leggja avgjald á plastikposar fyri at verja umhvørvið, svarar Bárður Nielsen, at tað komst fyrst og fremst av tí, at tað varð so ringt at skipa fyrisitingarliga.